LM-015/2025

# Maritimur Mentanardepil

## Livandi siðaarvur, søga og savn

NÝGGJUR DEPIL Á GØRÐUNUM Í VÁGI



Vágs Sóknar Bygdasavn

LM-015/2025





## Bakgrund

Í fleiri ár hevur verið arbeitt við ætlan um felags neyst og savn fyri Grindabátarnar í Vági. Nú er ætlanin víðkað til at fevna um ein Maritiman Mentanardepil.

# Hvørji eru vit?

## - hvør stendur aftanfyri ætlanina

Vágs Sóknar Bygdasavn stendur fyri verkætlanini í tøttum samstarvi við Grindabátarnar í Vági, sluppina Johanna TG 326, og eftirkomararnar hjá A/S J. Dahl á Gørðunum, sum m.a. hava eina røð av týðandi skjølum frá Garða-handlinum í varðveitslu.





LM-015/2025

# Maritimur Mentanardepil í Vági

## Endamál

### Seta á stovn Maritiman Mentanardepil

Við hesari verkætlan settur Vágs Sóknar Bygdasavn á stovn Maritimur Mentanardepil á Gørðunum í Vági.

### Tryggja felags siðaarv okkara

Fyri at tryggja varðveitslu av okkara felags siðaarvi og søgu við tilknýti til havið, og tað maritima økið, og handverkið við tilknýti til bátasmíð.

### Siðaarvurin atkomiligur fyri almenningin

Og harnæst fyri at gera siðaarvin og søguna atkomiliga hjá almenninginum í skipaðum framsýningarhølum.

LM-015/2025



# Á Gørðunum í Vági

Maritimur Mentanardepil í søguligum øki

### Týðandi vinnuøkið í Vági og í Føroyum

Økið á Gørðunum í Vági, har A/S J. Dahl hevði virksemi, var eitt av týðandi økinum fyri vinnuliga framburðin í Vági og í Føroyum frá 1870unum fram til 1930ini.

### Frá vinnuligum og handilsligum depli

Fyri 120 árum síðani var hetta vinnuligi- og handilsligi miðdepilin í Vági og í økinum var eisini fólkaskúli og kirkja.

### Til mentunarligan miðdepil í Vági

Økið á Gørðunum er í dag í stóran mun mentunarmiðdepil í Vági við listasavni, bygdasavni, mentanarhúsi og neystum við gomlum føroyskum bátum. Harumframt eru matstovur, kafe, nano-ølbryggjarí, skeinkistøð og fleiri handlar í økinum.

# Føroyski báturin og grindabátarnir í Vági

Ein týðandi partur av livandi mentanararvi okkara




## Føroyski báturin

Í øldir var føroyski báturin grundarlag undir húskjum og seinni eisini undir fyritøkum kring landið, soleiðis eisini í Vági.



## Grindabátarnir í Vági

Í Vági eru fleiri av teimum gomlu útróðrar-bátunum, 8- og 10-mannafør, varðveittir í upp-runalíki og í dag kendir sum grindabátarnir í Vági. Bátarnir eru 10 í tali.

LM-015/2025

# Súðubygdi báturin og UNESCO

## Siðaarvurin hjá mannaættini

### Grindabátarnir og siðaarvur

Grindabátarnir í Vági eru ein týðandi partur av livandi maritima mentanararvi og siðaarvi okkara. Tann elsti av teimum 10 grindabátunum, Gjógvarábáturin, er smíðaður í 1873.



### UNESCO og krøv til Føroyar

Við innskrivingini eru eisini krøv sett føroyska samfelagnum um at tryggja føroyska bátinum og bátasmíð framhaldandi lívføri fyri komandi ættarlið.

unesco
Intangible Cultural Heritage

LM-015/2025



# Neyst og framsýning

## Maritimur Mentanardepil

### Tryggar karmar og atkomiligheit

Í Mentanardeplinum verður neyst til grindabátarnar, har tað eisini verður framsýning av lutum, myndum og søguni, sum hevur tilknýtið til grindabátarnar og grind.

### Bátaverkstaður

Í sonevnda Pumpuloftinum, bygt í 1896, sum er fastbygt í Mentanardepilin, verður bátaverkstaður og umstøður til bátasmíð.



LM-015/2025

# Vestanbátar og Vágseiðið

## Maritimur Mentanardepil

Vágur er sermerkt við, at tað er tvírøtt, rógvast kundi út fyri eystan av Vágsfjørði og fyri vestan út av Vágseiði. Vágseiðið hevur ríkað søgu: Útróður, vestanbátar, neyst, og tráðbanar á Eiðinum.






Í Vági eru varðveittir einstakir av serbygdu "vestanbátunum", sum vórðu brúktir til útróður av Vágseiði. Søgan um útróður av Eiðinum og Vágseiðið verður partur av framsýningini.



- Í 1804 smíðaðu Nólsoyar Páll o.a. Royndina Fríðu, fyrsta skip, sum er smíðað í Føroyum. Hetta er ein týðandi partur av lokalu søguni og maritimu søgu føroyinga.
- Í Vági eru í varðveitslu fleiri lutir eftir Nólsoyar Páll, sum koma at verða partur av framsýningini í Maritima Mentanardeplinum.
- Í Maritima Mentanardeplinum verður framsýning av søguni kring Royndina Fríðu, fyrsta skip, sum er smíðað í Føroyum. Eisini verður framsýning um Nólsoyar Páll.



# Fyrsta skip smíðað í Føroyum

Maritimur Mentanardepil

LM-015/2025



# Týðandi partur av vinnusøguni

## Maritimur Mentanardepil

Í 1860 varð A/S J. Dahl á Gørðunum stovnað. Ein fyritøka, sum hevði reiðarívirksemi, fiskavirking og annað fjøltáttað virksemi.

Í tíðarskeiðinum frá 1880 til umleið 1930 var A/S J. Dahl ein av størstu fyritøkunum í landinum við virksemi bæði í Vági og í úthandlum kring landið.

A/S J. Dahl hevði høvuðs-sætið á Gørðunum. Og í Deplinum verða myndir, frásagnir, og lutir eftir A/S J. Dahl, og ikki minst eitt ríkt skjalasavn.





# Fiskaarbeiði

## Maritimur Mentanardepil

### Søgan um A/S J. Dahl á Gørðunum

Fiskaarbeiðið á Gørðunum var, saman við fiskiskapinum hjá Garðaskipunum, grundarlag undir fyritøkuni A/S J. Dahl á Gørðunum, sum eisini hevði handilsvirksemi í Vági og kring landið. Hendan søgan verður partur av framsýningini.

### Fiskaarbeiði og fólkavøkstur

Stóra virksemi bæði á landi og sjógvi dróg fólk úr øllum landinum og skapti stóran vøkstur í Vági. Hesin parturin av søguni verður eisini við í framsýningini.



LM-015/2025




# Johanna TG 326

**Ein týðandi partur av mentunararvinum**

Johanna TG 326 var fyrsta sluppin, sum A/S J. Dahl átti einsamalt. Hon varð smíðað í Rye í suður Onglandi í 1884 og keypt til Vágs í 1894.

Johanna varð í brúk til fyrst í 1970unum. Men lá so í nógv ár við kei í Vági. Í 1981 varð hon tikin upp á land og tá sett í uppruna stand – og flotað aftur í 1987.

Johanna TG 326 er í dag ein týðandi partur av livandi mentunararvi føroyinga og lokalu søguni.

Framsýningin í Maritima Mentanardeplinum fevnir eisini um søguna hjá Johannu TG 326, bæði søguliga partinum og eisini um megnar arbeiðið at fáa varðveitt sluppina í uppruna standi.

Við tað, at sluppin Johanna TG 326 liggur við bryggju í Vági, so verður hon ein natúrligur partur av framsýningini, sum fólk kunnu vitja eftir vitjan á Mentanardeplinum.



LM-015/2025

# Vágur og Seinni Heimsbardagi

Maritimur Mentanardepil



## Føroyar og Seinni Heimsbardagi

Føroyar eiga sín týðandi leiklut í Seinna Heimsbardaga, tá føroysk skip førdu fisk úr Íslandi og úr Føroyum til bretska marknaðin. Hetta hevði stóran týdning fyri Bretland, sum var í kríggi.

## Sluppsavnið hjá Malle Poul

Vág misti nógv undir Seinna Heimsbardaga. 9 skip, sum vórðu heimahoyrandi í Vági, fórust undir krígnum.

Í Vági er savn um Vág og Seinna Heimsbardaga, har modellir eru av teimum 9 sluppunum, sum fórust, og harumframt frásagnir, myndir og lutir. Hendan framsýningin verður flutt í Maritima Mentanardeplilin.

LM-015/2025

# Móttøka og felags hølir

Høvuðsinngongdin til Maritima Mentanardeplin er út ímóti Garðatúninum.

Við inngongdina verður móttøkuhøli við kafeøki og sølustað og WC-hentleikum. Ein lítil køkur verður eisini, eins og goymsluhølir.

Á 1. hædd verður grindabátaneyst, framsýningarøkið, skjalasavn og goymsluhølir.

Á 2. hædd verður eisini framsýningøkið, umframt hølir til framløgur, undirvísing og fundir.



LM-015/2025



# Ferðavinnan og vitjandi

## Maritimur Mentanardepil

### Nýtt spennandi tilboð í Suðuroynni

Maritimi Mentanardepilin verður eitt nýtt spennandi tilboð til vitjandi í Suðuroynni. Seinastu árini er orka løgd í at menna ferðavinnuna í Suðuroynni og hetta leggur afturat teimum tilboðunum og møguleikunum.

### Undirvísing og framløgur

Í Maritima Mentanardeplinum verða góð hølisviðurskifti til vitjandi skúlaflokkar og bólkar annars.



LM-015/2025



# Maritimur Mentanardepil

Samanumtøka

## Stovnseta Maritiman Mentanardepil í Vági

Til varðveitslu og framsýning av siða- og mentararvi okkara.

## Grindabátaneyst og savn

Í Maritima Mentanardeplinum kemur at verða grindabátaneyst og savn við fokus á grind og grindarakstur og á útróður.

## Bátasmíð og viðlíkahald av føroyska bátinum

Í Deplinum verður bátaverkstaður til bátasmíð og viðlíkahald av bátum.

## Útróður og Vágseiðið

Framsýning við tilknýtið til útróður og søguna kring Vágseiðið.

## Skipasøgan: Fyrsta skip smíðað í Føroyum

Fyrsta skip smíðað í Føroyum eigur natúrligt heima í Deplinum.

## Lokala vinnusøgan

Lokalu vinnusøgan verður partur av Maritima Mentanardeplinum.

## Vágur og Seinni Heimsbardagi

Framsýningin frá Seinna Heimsbardaga verður eisini partur av Deplinum.